





## <u>Kunning í samband við útferð hjá 3. flokki tann 21. juni 2018</u>

So er tíðin komin til, at vit í 3. flokki á skúlanum við Løgmannabreyt fara okkara árligu floksútferð uttan fyri Havnina.

Hósdagin tann **21. juni 2018** fara vit saman við starvsfólkum frá frítíðarskúlanum vestur í Vágar. Vit fara avstað sama, hvussu veðrið er ☺

Vit **møta sum vanligt** í skúlanum kl. 8. Bussurin fer frá skúlanum við Løgmannabreyt stundisliga kl. 8.15. Um tað er onkur, sum longu veit, at tað ikki liggur fyri at koma við nevnda dagin, vilja vit fegin fáa tað at vita, tí tað kann vera avgerðandi fyri, hvussu stóran buss vit skulu hava.

Í **Vágunum** fara vit fyrst at hyggja eftir Nykinum á Leitisvatni. Síðani ganga vit til flogvøllin, har vit skulu vitja Atlantic Airways kl. 10.30. Tá vitjanin er liðug fara vit til gongu til Sørvágs. Vit fara at hugna okkum, spæla á sandinum og annars spæla ymisk spøl.

Dagurin verður langur, tí er tað umráðandi, at øll hava ein góðan og stóran **matpakka** við, umframt ein vatndunk. Frítíðarskúlin skipar fyri, at børnini fáa millummála í **Sørvági**.

Tað er umráðandi, at børnini hava **skiftiklæðir og handklæði** við, tí vit fara at spæla á sandinum. Vit vilja mæla tykkum til at leggja skiftiklæðini í plastposar, so alt ikki verður vátt og skitið.

Av tí vit skulu ganga nakað, so er tað sera umráðandi, at alt hjá barninum er í einari tasku, og at tað megnar sjálvt at bera hana.

Vit vera aftur á skúlanum á Løgmannabreyt umleið kl. **16.00**. Tá eru foreldrini vælkomin at **avheinta børnini** eftir ein langan og vónadi góðan og stuttligan dag.

Vit gleða okkum at fara ein øðrvísi túr við tykkara børnum.

Vinarliga

Toymið í 3. flokki og starvsfólkini í frítíðarskúlanum



